# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Tað hendur øgiliga nógv á tónleikapallinum bæði Planet Awards, festivalar og GBOB, haraftur at velur Dimma eisini bestu fløgu, og tá nógvar broytingar eru á tónleikapallinum, mugu vit eitt umhugsa okkara støðu á honum, sigur Niels Halm, ið tó leggur dent á, at enn er eingin avgerð tikin, um prixið verður ella ei.*

NIELS HALM, STJÓRI Í NORÐURLANDAHÚSINUM



*Um 150 hval doyðu í grindini í Leynum í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Grind í Leynum

**Fitt av fólki hevði funnið sær veg til Leynar í morgun, har ein grind legði beinini. Drápið gekst skjótt og væl, og mett var, at grindin var á leið 150 hval**

**GRIND**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mett verður, at grindin, sum doyði í Leynum í morgun var upp á 150 hval. Nakað av fólkið hevði leitað sær til Leynar, eins og nakrir bátar vóru í drápinum, men tó ikki í ov stóran mun.

Sum vit skilja á lagnum, so gekst drápið skjótt og væl, og grindin var dripin eftir eini løtu.

Í løtuni verður grindin sleipað til Vestmanna, har hon verður merkt. Í skrivandi stund er ikki greitt um býti á grindini.

Tað vóru ikki bert grindafólk, sum høvdu funnið vegin fram til Leynasand í morgun. Nøkur forvitin ferðafólk stóðu eisini og hugdu at, og tey hava allarhelst fingið eitt eyka og óvæntað upplivisli á føroyatúrinum.

# Einki Prix Føroyar 2007?

**Hvørki Norðurlandahúsið, Kringvarpið ella Føroya Undirhaldstónleikarafelag kunnu vátta, at skipað verður fyri Prix Føroyum í 2007. Men tað tykist heilt greitt, at fyriskiparararnir umhugsa at gevast við stóru kappingini, ið hevur verið síðan 1995**

**TÓNLEIKUR**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni kjak.fo kom í gjár fram, at einki Prix Føroyar verður í 2007. Vit hava roynt at fingið tíðindi váttað, men hvørki úr Norðurlandahúsinum, Kringvarpinum ella Føroya Undirhaldstónleikarafelag verða tíðindi váttað, men tey verða heldur ikki avsannað.

- Vit hava havt ein fund, og eru farin hvør sær at tosa um málið innanhýsis, sigur Niels Halm stjóri í Norðurlandahúsinum.

Hann greiður frá, at innan fyri eina ella tvær vikur, verður endaliga avgerðin tikin, og so verður eitt samlað tíðindaskriv sent út. Eisini Ivan Niclassen úr Kringvarpinum er fáorðaður um málið.

- Vit hava ikki tikið nakra endaliga avgerð, um vit fara at skipa fyri Prix Føroyum komandi ár. Vit hava havt fund við FUT og Norðurlandahúsið, og tosa nú um málið innanhýsis. Vit koma væntandi við einum tíðindaskrivi um eina til tvær vikur, sigur Ivan Niclassen.

Hann vil ikki koma við øðrum viðmerkingum í løtuni, og vísir annars til Kaj Johannesen formann í Føroya Undirhaldstónleikarafelag, tí FUT er høvuðsfyriskipari.

Kaj Johannesen kann hvørki vátta ella ávátta, um Prix Føroyar verður á skránni í 2007. Hann sigur, at í løtuni viðgerð Kringvarpið málið innanhýsis, og tá Kringvarpið vendur aftur - møguliga einaferð í komandi viku - so verður avgerð tikin og eitt felags tíðindaskriv sent út.

Spurdur um hann kann ímynda sær Prix Føroyar uttan Kringvarpið og uttan Norðurlandashúsið við í fyriskipanini, sigur Kaj, at hetta hevur hann slettis ikki hugsað um enn. Men um tað verður aktuelt, so má tann møguleikin eisini umhugsast.

Vit spurdu Niels Halm, hví man yvirhøvur umhugsar málið, Prix Føroyar hevur verið ein tann týdningarmesti brikkurin í menningini av føroyskum tónleiki, síðan prixið kom á skránna fyrstu ferð, og hevur verið beinleiðis orsøk til, at sera nógv føroysk mentan er skapt.

- Tað hendur øgiliga nógv á tónleikapallinum bæði Planet Awards, festivalar og GBOB, haraftat velur Dimma eisini bestu fløgu, og tá nógvar broytingar eru á tónleikapallinum, mugu vit eitt umhugsa okkara støðu á honum, sigur Niels Halm, ið tó leggur dent á, at enn er eingin avgerð tikin, um prixið verður ella ei.

Prix Føroyar hevur verið annað hvørt ár síðan 1995, hetta hevur hvørja ferð verið ein av størstu tónleikahendingunum her á landi. Til finaluna ferðast hópin av útlendskum gestum til Føroyar at uppliva blómandi føroyska tónleikalívið. Kappingin hevur vakt stóran ans uttanlands, og fyrr í ár gjørdi Áland av at fara undir sína egnu útgávu av prixnum við føroysku kappingini sum íblástri.

Millum Prix vinnarnar higartil finna vit fólk sum Eivør Pálsdóttir og Høgna Lisberg við Clickhaze, Teit Lassen við Mark No Limits. Hetta eru í løtuni millum tey føroysku nøvnini, ið klára seg best uttanlands. Hóast prixið kann hava verið eitt slag av íblástri fyri hesi tónlistarfólk, er merkisverdigt, at tey eru farin uttanlands at royna seg sum einstaklingar. Tað er nevniliga so, at av teimum seks bólkunum, ið hava vunnið Prix Føroyar er bert ein til longur, tað er Gestir.

Prix vinnarar
1995 Moirae
1997 Mark No Limits
1999 Taxi
2001 Clickhaze
2003 Gestir
2005 Go Go Blues

ER TÍTT AVKAST EIN BÝUR Í KINA?

Føroya Banki bjóðar tær nú at gera íløgur í lánsbræv, sum fylgir gongdini hjá russiska, kinesiska og turkiska gjaldoyranum.

Keypskursurin er ásettur til kurs 103. Íløgan er trygg, tí um gjaldoyruni ikki styrkna í 2 ára tíðarskeiðnum, fæst ílagdi peningurin aftur fyri kurs 100.

Útlit eru til, at gjaldoyruni í Russlandi, Kina og Turkalandi styrkna mótvegis evruni og dollaranum í framtíðini.

- Verður samlaða avkastið í gjaldoyrakurvuni millum 0 og 20 prosent, verður ílagda upphæddin útgoldin fyri kurs 120.
- Verður samlaða avkastið í gjaldoyrakurvuni tað sama sum 20 prosent ella hægri, verður alt avkastið útgoldið.
- Við ongum avkasti ella viknandi gjaldoyrum verður innfríingarkrusurin á 100 útgoldin.



FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð

Vend tær til ein av okkara íløguráðgevum og fá meira at vita um PLUS 3 Valuta 2008.
Fá eisini meira at vita á www.foroyabanki.fo. Tíðarskeið: 9. okt. 2006–9. okt. 2008.

REPROZ